Bjørt Samuelsen
Høgni Hoydal
Aksel V. Johannesen
Ruth Vang
Henrik Old
Bjarni Kárason Petersen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot
til
3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 56/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Fiskidagaskipanin, leingja um gildistíðina á rættindum, føroyskir smábátar, tillagingar og fylgibroytingar)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 2 verður strikað.
   § 1, nr. 3-14 verða eftir hetta § 1, nr. 2-13.

2. Í § 2, stk. 2 verður "§ 1, nr. 2-10, 14 og 15" broytt til: "§ 1, nr. 2-8, 12 og 13".

Viðmerkingar
Til nr. 1: Við hesi broyting verður gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum ikki longd við einum ári.
Samgongan hevur valt at leingja loyvistíðarskeiðini úr 8 árum upp í 12 ár. So long rættindi høvdu ongantíð áður verið í føroysku fiskivinnulóggávuni. Í gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap vóru loyvini 10 ár, og í mong ár vóru tey rullandi. Politiska skipanin varð í 2007 samd um at siga loyvini upp, tí at rullandi loyvi yvir eitt longri áramál gevur privatlíknandi rættindi. Ynskið var sostatt at fáa tryggjað, at fiskatilfeingið veruliga er ogn Føroya fólks, og ikki ognin hjá privatum.
Uppskotssetararnir halda ikki, at tað er rætt, at samgongan longu nú ger 12 ára loyvini rullandi. Uppskotssetararnir halda, at 12 ára loyvi skulu vera 12 ára loyvi. Og um ætlanin er at gera broytingar í loyvinum, má hetta gerast við rímiliga drúgvari uppsagnartíð – til dømis við 3 árum.

Til nr. 2: Teknisk fylgibroyting í sambandi við broyting nr. 1.

Á Løgtingi, 16. desember 2020

Bjørt Samuelsen Høgni Hoydal Aksel V. Johannesen

Ruth Vang Henrik Old Bjarni Kárason Petersen